## Íslendsk rithøvundavitjan



Seinnapartin sunnudagin 10. februar, klokkan trý, skipa Rithøvundafelag Føroya og Norðurlandahúsið fyri upplestrartiltakið við tveimum íslendskum og einum føroyskum høvundi. Íslendsku høvundarnir eru Bjarni Bjarnason og Sindri Freysson. Báðir týðandi nøvn í íslendskum samtíðarbókmentum. Bjarni Bjarnason hevur latið frá sær bæði skaldsøgur, stuttsøgusøvn og leikrit. Stílurin hjá Bjarna Bjarnasyni hevur mangan dám av, at veruleiki og tað ævintýrkenda blandast saman. Sindri Freysson gav sína fyrstu bók út í 1992, tað var yrkingasavnið Fljótið sofandi konur. Síðani hevur hann latið frá sær leikrit, stuttsøgusøvn og tvær skaldsøgur: Augun í bænum ( Eyguni í býnum) og Flóttinn (Flóttin). Føroyski høvundurin, sum fer at lesa saman íslendsku gestunum er : Carl Jóhan Jensen. Hann fer at lesa úr nýskjaldrum sínum.

# Finnur Helmsdal er ein bumba

**Jenis av Rana sleppur ikki at gera av, hvussu Finnur Helmsdal úr Tjóðveldinum atkvøður í tinginum. Hetta sigur eykamaðurin, sum tekur sæti á tingi fyrsta dagin**

POLITIKKUR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fyrsta dagin tekur Finnur Helmsdal sæti á tingi fyri Annitu á Fríðriksmørk. Hetta kann vísa seg at gerast ein trupulleiki fyri Tjóðveldi og samgonguna sum heild. Tí Finnur Helmsdal, sum var annar av uppskotsstillarunum til málið um 266b, ætlar sær avgjørt ikki at lata Miðflokkin stýra sær, nú hann tekur sæti á tingið fyri Annitu á Fríðriksmørk. Síðani samgongan varð skipað hevur annars verið frammi, at treytin fyri einum samstarvi við Miðflokkin var, at flokkarnir bundu seg til, ikki at atkvøða fyri ella taka upp sokallaðu etisku málini komandi fýra árini.



*- Ger ein tinglimur ímóti avtaluni um etisku virðini, so hevur tann flokkurin ein innanhýsis trupulleika, sum avgjørt órógvar samstarvið í samgonguni, sigur formaður Miðfloksins. Her móttøka í Tinganesi*

### Fyri skrásettum parlagi

Men Finnur Helmsdal, sum er varamaður á tingi fyri Tjóðveldi, sigur seg ikki kenna til nakra avtalu við Miðflokkin um etisku málini, og hevur eisini ilt við at ímynda sær, at flokkur hansara hevur gjørt eina slíka avtalu.

- Í øllum førum má eg siga, at var við til samráðingarnar, so hevði eg ikki gingið undir eina slíka avtalu, sigur Finnur Helmsdal við Sosialin.

Spurdur, hvat hann møguliga hevði atkvøtt, um til dømis onkur í andstøðuni spælir hund og leggur uppskot fram um til dømis skrásett parlag, sigur Finnur Helmsdal, at hann sjálvandi atkvøður fyri einum slíkum uppskoti.

### Smalt grundarlag

Men hvat sigur hann so til, at hetta møguliga kundi havt við sær, at Miðflokkurin tók seg úr samgonguni, spyrja vit hann. Og hann sigur, at um samgongan byggir á so smalt grundarlag, so hevur hon lítla heimild at vera til.

- Men sum sagt, so havi eg ilt við at trúgva, at flokkurin hevur bundið seg til eina slíka avtalu. Og Jenis av Rana skal ikki avgera, hvat eg atkvøði fyri, sigur Finnur Helmsdal.

### Skuldi hann útihýsast?

Tá landsstýrisfólk skuldu veljast fyri Tjóðveldi, vóru røddir frammi um, at tað var týðandi at halda Finn Helmsdal úti. Kann tað hugsast, at formaður floksins longu tá hevur sæð fyri sær, at Finnur fór at verða ein vandi fyri arbeiðsfriðin í samgonguni?

- Eg havi onga viðmerking til, um hetta kann hava samband við hvørt annað. Men tað kann eg illa ímynda mær, sigur Finnur Helmsdal.

### Klokkuklár avtala

Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, tvíheldur um, at teir tríggir flokkarnir í samgonguni høvdu eina klokkuklára avtalu um etisku málini.

- Hetta var fremsta treytin fyri, at vit yvirhøvur fóru undir samráðingar við Tjóðveldi og Javnaðarflokkin. Tað gjørdu vit greitt longu á fyrsta fundinum fríggjakvøldið.

Jenis av Rana sigur, at atkvøður ein samgongulimur móti avtaluni, so er talan um avtalubrot.

Spurdur um samgongan eisini kann binda tinglimir, sum ikki vóru við til samgongusamráðingarnar, sigur Jenis av Rana, at avtalan var púra greið: Etisku málini skulu liggja hesi fýra árini.

- Ger ein tinglimur ímóti hesum, so hevur flokkurin ein innanhýsis trupulleika, sum avgjørt órógvar samstarvið í samgonguni, sigur formaður Miðfloksins.



*Finnur Helmsdal, sum tekur sæti á tingi fyri Annitu á Fríðriksmørk sigur seg ikki kenna til nakra avtalu við Miðflokkin um etisku málini*

# Atlantic Airways undirskrivar sáttmála við SAS

**Nýggja avtalan við SAS er størsti einstaki sáttmálan nakrantíð hjá føroyska flogfelagnum**

FLOGFERÐSLA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað eru longu mong ár liðin síðani leiðslan í Atlantic Airways viðurkendi, at skal felagið hava lív lagað, er neyðugt við støðugari víðkan av virkseminum.

Tí kemur tað eisini væl við, nú felagið hevur gjørt avtalu um at leiga skandinaviska flogfelagnum SAS trý flogfør við manningum.

Atlantic Airways hevur longu frammanundan avtalur um flúgving fyri SAS, so nýggi sáttmálin er í roynd og veru ein víðkan av verandi samstarvi millum feløgini bæði.

### Inn fyri DASH 8

Sáttmálaskeiðið er ávikavist 12, 13 og 14 mánaðir fyri tey trý flogførini, sum skulu røkja rutuflúgving fyri SAS millum Keypmannahavn og London, Birmingham og Stavanger. SAS hevur havt trupulleikar við DASH 8 flogførunum, og hevur Atlantic Airways flogið fyri SAS við fyrst einum flogfari og síðan einum aftrat.

Partarnir hava eisini gjørt sáttmála um, at Atlantic Airways leigar flogmenn frá SAS.

- Hetta er størsti einstaki sáttmáli, sum Atlantic Airways hevur gjørt um flúgving fyri onnur, segði ein fegin Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, á tíðindafundi á Hotell Hafnia í morgun.

- Tað er virðismikið fyri okkum at fara undir eitt so víðfevnt samstarv við eitt viðurkent felag sum SAS. Vit hava góðar royndir við okkara samstarvi við SAS higartil og gleða okkum til at menna samstarvið í framtíðini.

Magni Arge sigur, at tað er ilt at siga nágreiniliga hvørjar upphæddir talan er um. Men ein 3-siffrað milliónaupphædd í umsetningi er ikki av leið.

- Um vit siga, at vit í fjør flugu 4800 chartertímar, so verður talið omanfyri 8000 tímar í 2008. Og tað er sjálvandi sera gott fyri felagið, sigur Magni Arge.

### Góð útlit fyri 2008

Magni Arge sigur, at sáttmálin við SAS tryggjar Atlantic Airways eina skilagóða nýtslu av tøka kapasitetinum til leiguflúgving í 2008 og meginpartin av 2009. Sostatt hevur sáttmálin positiva ávirkan á fíggjarligu útlitini fyri 2008.

Sambært Atlantic Airways hevur felagið eisini longt sáttmálarnar um at leiga tvey flogfør frá British Airspace, sum annars skuldu latast aftur í 2007. Hesi flogfør verða nú í flotanum til ávíkavist apríl og oktober 2009.




*Magni Arge skrivar undir avtaluna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Atlantic Airways eigur í løtuni fimm flogfør og leigar tvey. Fyri góðari viku síðan skrivaði felagið sáttmála við flogverksmiðjuna Airbus um at keypa eitt nýtt flogfar av slagnum A 319, sum verður sett í flúgving í 2011.